

# Ung í Føroyum 2010 nærkast!

Frá 26. til 28. februar verður Norðurlandahúsið rannvælað. Húsið fer at surra av virksemi, áræði og ikki minst skapanarhuga. Hetta vikuskiftið er tað, at ársins Ung í Føroyum-stevna fer av bakkastokki.

Ung í Føroyum er ein heilt serlig mentanarhending, har ung í aldrinum 13 til 18 ár sleppa at geva sítt boð uppá, hvat ungdómsmentan er. Í ár eru seks verksmiðjur við tónleiki, dansi, sirkusi, myndlist, design og skriving. Verksmiðjuleiðararnir skulu vera vegleiðarar meira enn leiðarar, teir hava ikki fasta skrá lagda fyri verksmiðjuna, men skulu í samstarvi við tey ungu seta leggja vikuskiftið til rættis, so øll fáa sum mest burturúr á tí støði, tey eru komin til.

Og tað eru veruliga dugnalig listafólk, sum verða vegleiðarar: Á tónleikaverksmiðjuni verða Lena og Niclas, sum øll ung kenna og nógv elska, Vígdis Hentze kemur heim úr New York at veglaiða dansararnar, yrkarin og rokktónleikarin Petur Pólson stendur á odda fyri skriviverksmiðjuni, sniðgevin Katrina í Geil hevur designverksmiðju, listamaðurin Janus á Húsagarði skal læra frá sær á myndlistaverksmiðuni og franski klovnurin og línudansarin Joel Colas kemur beint úr Fraklandi at hava sirkusverksmiðjuna undir hond.

Meðan arbeitt verður, eru verksmiðjurnar stongdar fyri vitjandi, bert ein hevur óavmarkaðað atgongd og tað er orkesturleiðarin Bernharður Wilkinson, sum skal orkestrera stóru almennu sýningina sum verður sunnudagin 28. februar kl. 18 við brotum av øllum tí, sum er hent á stevnuni.

**Fyrireikandi fundur**

Nú um vikuskiftið hittust meiri enn 80 fólk í Norðurlandahúsinum til fyrireikandi fund um Ung í Føroyum. Hetta vóru allir teir ungu luttakararnir, teir av verksmiðjuleiðarunum, sum eru í landinum og ein bólkur av ungum hjálparum, nevnd stórasystkin.

Tey ungu vóru kunnaði um stevnuna og listaverkini, sum skulu vera við á framsýningini latin inn. Verksmiðjuluttakarar og leiðarar fingu høvi at hittast og leggja fyrstu ætlanir fyri teir spennandi dagarnar.

Stemingurin var løddur av gleði og spenningi og alt boðar frá eini frálíkari stevnu um hálva aðru viku.

**Stuðlar**

Stevnan hevur fingið Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu, sum verndara, og hon fer at seta stevnuna fríggjadagin 26. februar kl. 17.30. Trygg-ingarfelag Føroya er høvuðsstuðul og veitir eisini tilfar til Miðlabólkin og Skriviverksmiðjuna.

Atgongumerki til stóru sunnudagssýningina eru longu at fáa á heimasíðu Norðurlandahúsins, www.nlh.fo

# Reyður dagur í Bovling í Leirvík leygardagin

TÍÐINDASKRIV
*frá Vodafone*

Sum nakað nýtt skipar Vodafone fyri einum stórum ókeypis tiltaki í Bovling í Leirvík leygardagin 20. februar. Á skránni er ymiskt undirhald, kappingar og okkurt leskiligt til tey vaksnu og børnini, samstundis sum øll hava møguleika til at fáa eitt óbindandi heildarprát við ráðgevarar frá Vodafone.

**SKRÁ:**

Bovlingkapping kl. 13-17
Vodafone skipar fyri einari stórari bovlingkapping í sambandi við Reyða Dagin. Allar breytirnar eru leigaðar frá kl. 13-17. Ætlanin er, at tríggjar breytir eru til børn upp til 12 ár. Besti leikarin vinnur eina Sony Ericsson S312, virði kr. 950. Tríggjar breytir verða somuleiðis til tey vaksnu, frá 13 ár og upp. Besti leikarin vinnur eina lekkra BlackBerry Bold, virði kr. 5.995.

**Mini Disko og annað kl. 14-15**

Jóannes Joensen, sum hevur undirhildið á Mallorka í mong ár, kemur at undirhalda børnunum í Eysturkommunu, við einum mini disko, spølum og tónleiki. Tey vaksnu kunnu sjálvandi eisini vera við, um tey hava hug til tess.

**Tónleikur kl. 14-15**

Monika Stauss og Dánjal Eysturstein spæla.

**Matur og drekka**

Vodafone bjóðar kaffi og køkur til tey vaksnu, og børnini fáa sodavatn og góðgæti.

**Tekna hald og fá eina ókeypis fartelefon**

Tey fyrstu 50 viðskiftafólkini, sum stovna hald frá Vodafone, fáa eina nýggja Vodafone 136 fartelefon.

**Heildarprát**

Vodafone ynskir tað besta fyri viðskiftafólkini. Møguleiki er sostatt at taka eitt óbindandi heildarprát við ein ráðgeva, har tygara verandi loysnir og framtíðar tørvur verður gjøgnumgingin. Sí meira á baksíðuni.

Starvsfólkini á Vodafon vóna, at nógv fólk koma til tiltakið.

# Lundin Software skal halda Bakkafrost við líka

TÍÐINDASKRIV

Sum partur av nýggjum KT-bygnaði hevur P/F Bakkafrost valt viðlíkahaldsskipanina OPUS, sum er ment av Lundin Software, til at stýra viðlíkahaldinum hjá fyritøkuni.

P/F Bakkafrost hevur í dag sera víðfevnandi virksemi og hevur tí tørv á góðum amboðum til stýring av viðlíkahaldinum av ognum. Skipanin frá Lundin Software verður nú lyklaskipan í virkseminum hjá P/F Bakkafrost og fer at verða brúkt á fleiri støðum kring landið, s.s. virkjum, skipum og alistøðum. Ein íverksetanarætlan fyri OPUS er gjørd og byrjar P/F Bakkafrost beinanvegin at brúka skipanina og síðani verður hon yvir tað komandi tíðina innkoyrd og tikin í nýtslu fult út ígjøgnum fyritøkuna.

Sera stór orka er løgd í at menna OPUS og er skipanin eitt sterkt og hátøkniligt amboð, sum er lætt at brúka, og gevur brúkaranum møguleika at miðsavna upplýsingar um mannagongdir, eykalutir og annað, ið hevur við viðlíkahald at gera.

Viðlíkahaldsskipanin OPUS er upprunaliga sprottin úr tøttum samstarvi við P/F Havsbrún (www.havsbrun.fo) í Fuglafirði og teirra góðu royndir við skipanini hava gjørt, at skipanin nú verður boðin út til aðrar kundar. Lundin Software hevur sera drúgvar royndir innan viðlíkahaldsskipanir og hevur umframt OPUS, ið er serliga ætlað til viðlíkahald í ídnaði, eisini ment GANNET, sum í dag stýrir øllum viðlíkahaldi av flogførum og tyrlum hjá Atlantic Airways (gannet.lundin.fo)

Umframt viðlíkahaldsskipanir leggur Lundin Software seg eftir at menna skipanir við nýggjastu Microsoft tøkni og hevur í dag eitt sterkt lið av vælútbúnum og royndum forritarum (www.lundin.fo). Fleiri upplýsingar um P/F Bakkafrost og teirra virksemi kann finnast á www.bakkafrost.com.

ert tú ?
iðin, fyrikomandi
ítróttaráhugaður
sjálvstøðugur

Ein persónur verður í nærmastu framtíð lærlingur í deild okkara í Klaksvík. Um tú ert frískur og við uppá tað, so er tað kanska júst tær vit leita eftir. Lærutíðin við HH er 2 ár,og við FHS 3 ár.
Í hesum tíðarskeiði skal lærlingurin á skúla í Danmark 4 ferðir.
Ivast tú í nøkrum, ert tú vælkomin at ringja til Meinhardt, tlf. 219886 ella Kristian, tlf. 285310

Áhugaður?
Send umsøkn við prógvum og møguligum viðmælum til:
Intersport, Vágstún 1, 700 Klaksvík
í seinasta lagi 22. februar 2010

INTERSPORT
P/F TH. DAM ÍTRÓTTUR